Undirskrift formansins:_____

Postboks 2 . FO-710 Klaksvík . Faroe Islands . Tlf. 410000 . Fax. 410001

Klaksvíkar Býráð

Dagfesting: 27.01.2022 kl. 17:30
Málnr.: 21/01365 Gerðabók
Nevndarlimir: Karl Johansen, Atli S. Justinussen, Jógvan Skorheim, Gunvá við Keldu, Oddmar á Lakjuni, Jóhanna Christiansen, Eyðstein Ó. Poulsen, Annika S. Biskopstø, Óli M. Lassen, Signhild V. Johannesen og Tummas J. Lervig
Varalimir: Símun á Høvdanum møtti fyri Oddmar á Lakjuni og Beinta Klakstein møtti fyri Jógvan Skorheim
Ikki møtt:
Onnur: Rúni Rasmussen, kommunustjóri
Protokollførari: Jensa Anthoniussen, fulltrúi

Málsyvirlit		
Til viðgerðar		
1/22	22/00124-3	Býráðslimum berst frá at møta á býráðsfundi (Oddmar á Lakjuni og Jógvan Skorheim)
2/22	22/00197-2	Býráðslimi berst frá at røkja býráðsarbeiðið í meira enn samfullar 14 dagar (Annika S. Biskopstø)
3/22	21/02173-3	Sundurbýti av matr.nr. 91 í Klaksvík
4/22	22/00057-3	Sundurbýti av matr.nr. 1613 í Gerðum
5/22	22/00061-2	Umsókn um samanlegging og sundurbýti til eigaraíbúðir - matr.nr. 1006ac, ad og ae í Klaksvík
6/22	21/02118-3	Vinnuøki á Bumshamri - loyvi til víðarisølu
7/22	21/01280-22	Grøn orkuloysn á Fossum
8/22	22/00052-2	Leinging av leigusáttmála – Dr. Margrethu Barnagarður
9/22	22/00034-1	Játtan til virksemi, Heilsunevndin - *flyting millum kontur, fyrra viðgerð*
10/22	22/00058-1	Bilar hjá Grót- og tilfarssøluni og Klaksvíkar Havn - *flyting frá rakstri til íløgur, fyrra viðgerð*
11/22	21/01884-6	Umsókn um rakstrarstuðul fyri ár 2022, Gloria - *flyting millum kontur, seinna viðgerð*
12/22	21/01954-2	Leikvøllurin á Másheyggi - *flyting millum kontur, seinna viðgerð*
13/22	21/02045-1	Ung í Arbeiði / Trivnaðardeildin - *flyting millum kontur, seinna viðgerð*

Til viðgerðar

1/22
22/00124-3 Býráðslimum berst frá at møta á býráðsfundi (Oddmar á Lakjuni og Jógvan Skorheim)

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.
1 Klaksvíkar Býráð	27.01.2022	1/22

Frágreiðing um málið:
Oddmar á Lakjuni, býráðslimur valdur fyri Fólkaflokkin, hevur boðað frá, at hann hevur forfall til býráðsfundin 27. jan. 2022. Næstvaldur á listanum er Símun á Høvdanum.

Jógvan Skorheim, býráðslimur valdur fyri Sjálvstýri, hevur eisini boðað frá, at hann hevur forfall til býráðsfundin 27. jan. 2022. Næstvaldur á listanum hevur eisini forfall. Triðvalda er Beinta Klakstein.

Lógargrundarlag:
Kommunustýrislógin, § 18, stk. 1 og stk. 3

Fíggjarligar avleiðingar:
Fundarsamsýning til tiltakslimirnar, um býráðið avger at lata teir taka sæti í býráðnum til fundin.

Tilmæli:
Mælt verður býráðnum til at taka støðu til innkalling av tiltakslimum fyri Oddmar á Lakjuni og Jógvan Skorheim.

Klaksvíkar Býráð 27. januar 2022:
Einmælt samtykt at lata Símun á Høvdanum og Beinta Klakstein taka sæti í býráðnum til fundin.

2/22
22/00197-2 Býráðslimi berst frá at røkja býráðsarbeiðið í meira enn samfullar 14 dagar (Annika S. Biskopstø)

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.
1 Klaksvíkar Býráð	27.01.2022	2/22

22/00197-2 Býráðslimi berst frá at røkja býráðsarbeiðið í meira enn samfullar 14 dagar (Annika S. Biskopstø)

Frágreiðing um málið:
Annika S. Biskopstø, býráðslimur vald fyri Tjóðveldið, hevur boðað frá, at henni berst frá at røkja býráðsarbeiðið í nakrar mánaðir fram frá 1. februar at rokna. Næstvaldur á vallistanum er Rógvi Jacobsen.

Lógargrundarlag:
- Kommunustýrislógin, § 18, stk. 2 og stk. 3:

Stk. 2. Berst kommunustýrislimi væntandi frá at røkja starv sítt í meira enn 14 samfullar dagar vegna annað alment starv, heilsustøðu ella aðra lógliga orsøk, skal viðkomandi boða borgarstjóranum frá, og borgarstjórin skal síðani geva tiltakslimi fundarboð.
Stk. 3. Kommunustýrið ger av, um treytirnar fyri innkallan av tiltakslimi eru loknar.

- § 6 í Reglugerð fyri innkalling av varalimum í býráðið og føstu nevndir býráðsins, samtykt av býráðnum 22.03.2011, § 6:
  Um býráðslimur fær forfall ... í eitt tíðarskeið, sum er longri enn 2 mánaðar, tekur næsti persónur á viðkomandi vallista sæti bæði í býráðnum og sum limur/varalimur í teimum [býráðs]*nevndum, har býráðslimurin, sum fer í farloyvi, er limur/varalimur.*

Fíggjarligar avleiðingar:
Fundarsamsýningar til tiltakslimin, um býráðið avger at lata hann taka sætið í nevndum og býráð í fráverutíðarskeiðinum.

Tilmæli:
Býráðið verður at taka støðu til, um treytirnar fyri innkalling av tiltakslimi eru loknar. Í játtandi føri, verður Rógvi Jacobsen at taka sæti í býráði og teimum býráðsnevndum, Annika S. Biskopstø hevur sæti í, frá 1. februar 2022.

Klaksvíkar Býráð 27. januar 2022:
Annika S. Biskopstø luttók ikki í viðgerðini av málinum vegna ógegni.
Einmælt samtykt at lata Rógva Jacobsen taka sæti í býráði og nevndum fyri Anniku S. Biskopstø frá 1. februar 2022.

3/22
21/02173-3 Sundurbýti av matr.nr. 91 í Klaksvík

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.
1 Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin	17.01.2022	3/22
2 Klaksvíkar Býráð	27.01.2022	3/22

Frágreiðing um málið:
Í samband við ætlaða bygging av íbúðum á matr.nr. 91 við Stoksoyrarveg, søkir eigarin um sundurbýti av ognini í 6 lutir. (sí viðløgdu umsókn)

Fakta um matr.nr. 91:
Vídd: 1538 m^2

Vídd pr. frábýttan lut: 118 m^2 + 138 m^2 felagsøki. Tilsamans 256 m^2 pr. lut.

<u>Tekniska umsiting hevur hesar viðmerkingar til umsóknina:</u>
Byggisamtyktarlig áseting: Økispartur A15, útlagt til blandaða bygging (íbúðar- og vinnuendamál),
Minsta mark grundøkjavídd: 200 m^2 fyri samanbygd hús og íbúðir.

<u>Lógargrundarlag:</u>
Matrikullógin
Almenna Byggisamtyktin

<u>Fíggjarligar avleiðingar:</u>
Kommunan bert ummælandi

<u>Tilmæli:</u>
Vísandi til omanfyrinevnda, mælir tekniska umsiting til at viðmæla umsóknini.

<u>Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin 17. januar 2022:</u>
Nevndin tekur undir við tilmælinum, dagf. 06-01-2022.

<u>Klaksvíkar Býráð 27. januar 2022:</u>
Tilmælið frá UBN 17-01-2022 einmælt samtykt.

4/22
22/00057-3 Sundurbýti av matr.nr. 1613 í Gerðum

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.
1 Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin	17.01.2022	4/22
2 Klaksvíkar Býráð	27.01.2022	4/22

Frágreiðing um málið:
Umhvørvisstovan biður um kommununnar ummæli til sundurbýti av matr.nr. 1613 í Gerðum, soleiðis at teir 11 fermetrarnir við ábygdum hjalli út móti Kráargøtu verða frábýttir og síðani seldir grannunum – eigarar av ávikavist matr.nr. 1604b og 1610.

Tekniska umsiting hevur hesar viðmerkingar til umsóknina:
Byggisamtyktarliga liggur hjallurin í sama økisparti sum matr.nr. 1604b (A10 - Blandað íbúðar- og vinnuøki), meðan matr.nr. 1610 og restin av matr.nr. 1613 liggja í økisparti D5 (Grønt øki).
Minsta mark grundøkjavídd í økisparti A10 er 200 m^2. Frábýti av 11 m^2 til ein sjálvstøðugan matrikul er sostatt ikki í tráð við hesar reglur.
Staðsetingin og nýtslan talar tó fyri at viðmæla umsóknini – og verður í tí føri lagt upp til, at nevndu 11 m^2 verða skrásettir sum partur av matr.nr. 1604b og 1610 við helvt til hvønn partin.

Lógargrundarlag:
Matrikullógin

Fíggjarligar avleiðingar:
Kommunan bert ummælandi

Tilmæli:
Velur nevnd og býráð at viðmæla umsóknini, mælir tekniska umsiting til, at hetta verður gjørt við teirri treyt, at frábýttu 11 m^2 verða skrásettir til matr.nr. 1604a og 1610, - hetta fyri at tryggja, at ognarrætturin til hjallin fylgir matriklunum og ikki persónunum.

Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin 17. januar 2022:
Nevndin tekur undir við tilmælinum, dagf. 11-01-2022.

Klaksvíkar Býráð 27. januar 2022:
Tilmælið frá UBN 17-01-2022 einmælt samtykt.

5/22
22/00061-2 Umsókn um samanlegging og sundurbýti til eigaraíbúðir, matr.nr. 1006ac, ad og ae í Klaksvík

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.
1 Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin	17.01.2022	5/22
2 Klaksvíkar Býráð	27.01.2022	5/22

Frágreiðing um málið:
Í samband við bygging av íbúðum á matr.nr. 1006ac, 1996ad og 1006ae undir Grashjalla biður Umhvørvisstovan um kommununnar ummæli til samanlegging og hereftir sundurbýti í 8 eigaraíbúðir.

Frágreiðing um málið:
Byggisamtyktarlig áseting: Økispartur A18 – útlagt til blandaða bygging (íbúðar- og vinnuendamál)
Minsta mark grundøkjavídd: 150 m^2 fyri íbúðir

Matr.nr.1006ac, ad og ae eru tilvíddar 546 m^2 hvørt = 1638 m^2 tilsamans
Vídd grundøki pr. íbúð eftir samanlegging sotatt: 205 m2.



Lógargrundarlag:
Matrikullógin
Almenna Byggisamtyktin
Eigaraíbúðarlógin

Fíggjarligar avleiðingar:
Kommunan bert ummælandi

Tilmæli:
Vísandi til omanfyrinevnda, mælir tekniska umsiting til at viðmæla umsóknini

Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin 17. januar 2022:
Nevndin tekur undir við tilmælinum, dagf. 10-01-2022.

Klaksvíkar Býráð 27. januar 2022:
Tilmælið frá UBN 17-01-2022 einmælt samtykt.

6/22
21/02118-3 Vinnuøki á Bumshamri - loyvi til víðarisølu

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.
1 Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin	17.01.2022	8/22
2 Havna- og Vinnunevndin	19.01.2022	5/22
3 Klaksvíkar Býráð	27.01.2022	6/22

Frágreiðing um málið:
Umsitingin greiðir nærri frá málinum í skrivi, dagf. 3. jan. 2022.

Í stuttum snýr málið seg um, at søkt verður um at fáa servituttásetingina um víðarisølu og ábygging á økinum strikaða og at geva samtykki til, at IRF yvirtekur ognirnar matr.nr. 1g, 1i og 1h í Klaksvík frá eigaranum.

Klaksvíkar Býráð hevur átalurætt uppá tinglisnu servituttirnar á økinum, sum fyri matr.nr. 1i og 1h m.a. eru soljóðandi:
pkt 1: *Grundstykkið má ikki verða selt øðrum uttan býráðsins góðkenning* og
pkt 3: *Keyparin pliktar seg til at byrja byggibúning av økinum og byggja virkisbygning í eini samanhangandi arbeiðsgongd, soleiðis at byggingin kann vera liðug innan 3 ár frá dagfestingini av hesum ognarbrævi".*

Lógargrundarlag:
Kommunufulltrúin

Fíggjarligar avleiðingar:
-

Tilmæli:
Vísandi til, at kommunan – hóast tinglisin rættindir um afturtøku, og afturvendandi fyrispurningar frá eigaranum um yvirtøku - ikki hevur víst økinum áhuga, hevur tekniska umsiting onki í móti, at umsóknin um servituttstriking verður gingin á møti, og ognirnar seldar IRF.
Til kunningar kann nevnast, at IRF er ein kommunalur felagsskapur, og hevði ein møgulig kommunal søla til felagsskapin tískil verið undantikin kravinum um alment útboð.

Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin 17. januar 2022:
Nevndin tekur undir við tilmælinum, dagf. 03-01-2022.

Havna- og Vinnunevndin 19. januar 2022:
Nevndin tekur undir við UBN 17-01-2022. Nevndin heitir á IRF um at savna stóru bilarnar hjá felagsskapinum á økjum, sum IRF hevur ræði á. Eitt øki, sum er umhvørvisgóðkent.

Klaksvíkar Býráð 27. januar 2022:
Tilmælið frá HaVN 19-01-2022 einmælt samtykt.

7/22
21/01280-22 Grøn orkuloysn á Fossum

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.
1 Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin	17.01.2022	12/22
2 Tekniska Nevnd	19.01.2022	4/22
3 Fíggjarnevndin	25.01.2022	5/22
4 Klaksvíkar Býráð	27.01.2022	7/22

Frágreiðing um málið:
Í skrivi dagf. 12. jan. 2022 verður m.a. greitt frá, at býráðið 18. nov. 2021 samtykti at velja eina grøna orkuloysn fyri útstykkingina á Fossum.

Síðani tá hava tvær ítøkiligar loysnir verið uppi og vent, sjóhiti og jarðhiti. Ráðgevingarfyritøkan SMJ hevur í meting vístá, at í mun til kostnað og praktisk viðurskifti er best at velja aðra loysn enn sjóhita til útstykkingina á Fossum, og at jarðhiti er eitt gott boð uppá eina grøna orkuloysn, ella ein triðja loysn kundi verið kannað.

Fyrisitingin hevur síðani umrøtt støðuna um grøna orkuloysn og vil gera vart við, at kommunan má verða fyrireikað uppá hetta grøna átakið og liva upp til tað. Mett verður, at tørvur er á at hava ein dagførdan og meiri ítøkiligan umhvørvis- og orkupolitikk, ið hevði kunnað styrkt og stuðlað avgerðini um grøna orkuloysn á Fossum. Tí verður mælt til, at fyrisitingin fær meira tíð at viðgera støðuna, so kommunan hevur eitt sakligt grundarlag at taka støðu út frá.

Lógargrundarlag:
Kommunufulltrúin
Orku- og umhvørvispolitikkurin hjá kommununi. Hesin hevur tørv á at blíva endurskoðaður.

Fíggjarligar avleiðingar:
1,749 mió. kr. eru sáttmálabundnar ísb. við 1. byggistig á Fossum ísb. við sjóhita.

Tilmæli:
Vísandi til niðurstøðuna frá SMJ, verður mælt til at sleppa ætlanini um sjóhita á Fossum.
Fyrisitingin vendir aftur við tilmæli um grøna orkuloysn.

Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin 17. januar 2022:
Nevndin tekur undir við tilmælinum, dagf. 12-01-2022.

Tekniska Nevnd 19. januar 2022:
Nevndin tekur undir við UBN 17-01-2022.

Fíggjarnevndin 25. januar 2022:
Nevndin tekur undir við TN 19-01-2022.

Klaksvíkar Býráð 27. januar 2022:
Tilmælið frá FíN 27-01-2022 einmælt samtykt.

8/22
22/00052-2 Leinging av leigusáttmála – Dr. Margrethu Barnagarður

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.
1 Trivnaðarnevndin Børn og Ung	18.01.2022	5/22
2 Fíggjarnevndin	25.01.2022	2/22
3 Klaksvíkar Býráð	27.01.2022	8/22

Frágreiðing um málið:
Formaðurin í stýrinum fyri KFUM & K í Klaksvík hevur vent sær til umsitingina við áheitan um at leingja leigusáttmálan millum kommununa og KFUM & K um hølir til Dr. Margrethu Barnagarð (verandi leigusáttmáli gongur út 1. feb. 2022), og at leigukostnaðurin fyri fermeturin hækkar úr 910 kr. upp í 1.000 kr. fyri fermeturin.

Grundleggjandi er umsitingin nøgd við samstarvið við Dr. Margrethu Barnagarð og KFUM & K kring leigusáttmálan, har býtið av viðlíkahaldsskylduni kanska serliga er viðkomandi at eftirmeta í hesum sambandi.

Grein 5 í verandi leigusáttmála, viðvíkjandi viðlíkahaldi, er soljóðandi: *Útleigari hevur uttanhýsis viðlíkahaldið av bygninginum, meðan øll innanhýsis røkt og viðlíkahald áliggur leigaranum [barnagarðinum = kommununi]. Eisini áliggur tað leigaranum at halda uttanumøkið.*

Lógargrundarlag:
Løgtingslóg nr. 67 frá 10. mai 2000 um dagstovnar og dagrøkt, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 45 frá 30. apríl 2018:

§ 3. Kommunan kann geva børnum, sum búgva í kommununi, tilboð um pláss á dagstovni og dagrøkt og hevur ábyrgdina fyri virkseminum.

§ 6. Avvarðandi kommuna og foreldur rinda tær útreiðslur, sum standast av virkseminum sambært hesi lóg. Foreldragjaldið skal tó í mesta lagi vera 30% av rakstrarútreiðslunum.

Stk. 2. Húsaútreiðslur verða rindaðar av kommununi.

§ 7. Dagstovnar og dagrøktir kunnu stovnsetast av kommununi sbr. hesi løgtingslóg. Landsstýrismaðurin skal kunnast um stovnsetanina.

Stk. 2. Kommunan kann geva øðrum t.d. fyritøkum og stovnum loyvi til at stovnseta dagstovn treytað av, at allar ásetingar í hesi lóg verða fylgdar.

§ 10. Kommunurnar hava eftirlit við dagstovnum og dagrøktum.

Stk. 2. Landsstýrismaðurin hevur yvirskipaða eftirlitið við, at kommunurnar umsita dagstovnar og dagrøktir sambært hesi lóg.

Fíggjarligar avleiðingar:
Uppskotið frá KFUM & K um leiguprís inniber fylgjandi fíggjarligar avleiðingar:

	Fermtr. inni	Fermtr. úti	Leiga pr. fermtr.	Leiga pr. mánað	Leiga pr. ár
Verandi leigusáttmáli	513 fermtr.	1.000 fermtr.	910,00 kr.	38.916,67 kr.	467.000,00 kr.
Nýggju leigusáttmáli	513 fermtr.	1.000 fermtr.	1.000,00 kr.	42.750,00 kr.	513.000,00 kr.
Tvs. meirkostnaður			90,00 kr.	3.833,33 kr.	46.000 kr.

Tilmæli:
Mælt verður nevndum og býráði til at taka undir við, at leigusáttmálin millum KFUM & K í Klaksvík og sjálvsognarstovnin Drotningar Margrethu Barnagarður verður longdur sambært uppskotinum frá KFUM & K, og at sáttmálalongdin verður ásett til 10 ár.

Trivnaðarnevndin Børn og Ung 18. januar 2022:
Nevndin tekur undir við tilmælinum. Meirkostnaðurin verður borin av *barnaansing felags*.

Fíggjarnevndin 25. januar 2022:
Nevndin tekur undir við B&U 18-01-2022.

Klaksvíkar Býráð 27. januar 2022:
Jóhanna C. Christiansen luttók ikki í viðgerðini av málinum.
Tilmælið frá FíN 27-01-2022 samtykt við 9 atkv. fyri og ongari ímóti. BK atkvøddi ikki.

9/22
22/00034-1 Játtan til virksemi, Heilsunevndin - *flyting millum kontur, fyrra viðgerð*

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.
1 Heilsunevndin	17.01.2022	4/22
2 Trivnaðarnevndin Eldri og Bústaðir	18.01.2022	2/22
3 Fíggjarnevndin	25.01.2022	1/22
4 Klaksvíkar Býráð	27.01.2022	9/22
5 Klaksvíkar Býráð	24.02.2022	

Frágreiðing um málið:
Fundarumfarið í oktober í fjør viðgjørdu nevndir og býráðið spurningin um eina serstaka játtan til Heilsunevnd býráðsins. Viðfest er tann viðgerðin, har tað framgongur, at býráðið 28. oktober 2021 samtykti einmælt at taka hesa játtan við í arbeiðið við fíggjarætlan býráðsins fyri 2022.

Í politisku umrøðuni av málinum er komið fram, at tað liggur í kortunum, at játtanin til Heilsunevndina í fíggjarætlanini fyri 2022 skal vera 500.000 kr., og tað er í hesum sambandi, at málið – í samráð við borgarstjóran – við hesum verður lagt fyri avvarðandi nevndir og býráð.

Borgarstjórin og kommunustjórin hava heitt á roknskaparleiðaran um at gera eitt upplegg til flytingar millum kontur til fígging av hesum tørvi. Í skrivandi løtu fyriliggur hetta upplegg okkum kunnugt ikki, men verður tað lagt í málið, so skjótt tað verður okkum tøkt.

Lógargrundarlag:
Kommunustýrislógin

Fíggjarligar avleiðingar:
Samstundis verður eftir áheitan frá forkvinnuni í HeiN, her lagt fyri ein raðfesting av játtanini hjá HeiN fyri 2022:

1. Matarskipan á Skúlatrøð: 300.000 kr.
2. Serstøk játtan til Gigni: 70.000 kr.
3. Trø og vøkstur við Másheygg: 50.000 kr.
4. Ymisk onnur átøk: 80.000 kr.

Í løtuni verður arbeitt lógartekniskt við heimildini, til punkt nr. 2. Tí avhongur hetta punktið í raðfestingini av, hvørja niðurstøðu umsitingin kemur til í sínum arbeiði við hesum máli. Skuldi niðurstøðan verið, at hettar ikki letur seg fremja við lógarheimild, verður peningurin lagdur afturat punkt. 4 í staðin.

Tilmæli:
Mælt verður nevndum og býráðnum til at samtykkja omanfyri nevndu flytingar millum kontur, soleiðis at Heilsunevndin fær sína ætlaðu játtan á 500.000 kr. í fíggjarætlan býráðsins fyri 2022, og at taka støðu til raðfestingina av játtanini hjá HeiN fyri 2022.

Heilsunevndin 17. januar 2022:
Nevndin tekur undir við tilmælinum og at fíggingin verður útvegað samsvarandi viðfesta notatið frá kommunustjóranum dagfest 17-01-2022.

Trivnaðarnevndin Eldri og Bústaðir 18. januar 2022:
Nevndin tekur undir við TrN E&B, 18.01.2022.

Fíggjarnevndin 25. januar 2022:
Nevndin tekur undir við HeiN 17-01-2022.

Klaksvíkar Býráð 27. januar 2022:
Tilmælið frá FíN 27-01-2022 einmælt samtykt.

10/22
22/00058-1 Bilar hjá Grót- og tilfarssøluni og Klaksvíkar Havn - *flyting frá rakstri til íløgur, fyrra viðgerð*

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.
1 Havna- og Vinnunevndin	19.01.2022	3/22
2 Fíggjarnevndin	25.01.2022	3/22
3 Klaksvíkar Býráð	27.01.2022	10/22
4 Klaksvíkar Býráð	24.02.2022	

Frágreiðing um málið:
Á heysti 2020 varð samtykt, at nýggjur bilur skuldi keypast til grót- og tilfarssøluna fyri bilin frá 2005. Ein bilur fyri kr. 300.000 varð keyptur og hevur roynst væl.

Tó hevur grót- og tilfarssølan fingið fleiri uppgávur í samband við kavagrevsturin, har komið er fram til, at tað hevði verið betri, um talan var um bil við automatiskum gearum.

Eftir umrøðu við formannin í Havna- og vinnunevndini og vinnu- og mentanarstjóran, hevur Grót- og tilfarssølan biðið um tilboð frá bilasølum uppá sama slag av bili sum tann verandi, tó við automatiskum gearum.

Bíligara tilboðið við nøktandi innihaldi tykist vera kr. 328.890 umframt mvg.

Samstundis sum henda støða er viðvíkjandi grót- og tilfarssøluni, so er lastbilur hjá Klaksvíkar Havn næstan 12 ára gamal. Ynski hevur í eina tíð verið frá Klaksvíkar Havn um at skifta hendan bilin út, og havnameistarin hevur greitt frá, at tað hevði verið ein góð loysn, um havnin yvirtekur verandi bilin hjá Grót- og tilfarssøluni.

Mett verður, at verandi bilur hjá Grót- og tilfarssøluni hevur eitt virði á umleið kr. 230.000, sum Klaksvíkar Havn rindar Grót- og tilfarssøluni fyri bilin.

Sostatt verður kostnaðurin hjá Grót- og tilfarssøluni fyri ein bil, sum er eitt ár nýggjari og hóskar seg betri til virksemið hjá teimum umleið kr. 100.000.

Vísandi til, at Toyota bilurin hjá Klaksvíkar Havn er í góðum standi og hevur verið til øll eftirlit, verður mett, at hesin bilurin kann seljast í fríari sølu fyri umleið kr. 60.000.

Sostatt verður samlaði kostnaðurin fyri hesa dagføringina av bilunum á Havna- og vinnuøkinum umleið kr. 270.000, harav Grót- og tilfarssølan fíggjar kr. 100.000, meðan Havnin fíggjar umleið kr. 170.000.

Lógargrundarlag:
Kommunufulltrúin

Fíggjarligar avleiðingar:
Kr. 100.000 verða fluttar frá Grót- og tilfarssølan rakstur til Grót- og tilfarssølan íløga, meðan 170.000 kr. verða fluttar frá Havnin rakstur til Havnin íløgur.

Tilmæli:
Mælt verður til, at nevndirnar taka undir við, at nevndu keyp og sølur av bilum verða framd, og at hesi verða fíggjað av rakstrinum hjá Grót- og tilfarssøluni og Klaksvíkar Havn, og at ein flyting millum kontur

verður gjørd til endamálið, so bæði rakstrarstøðini hava bilar, sum eru dagførdir og hóskandi til endamálini.

Havna- og Vinnunevndin 19. januar 2022:
Nevndin tekur undir við tilmælinum dagf. 10-01-2022.

Fíggjarnevndin 25. januar 2022:
Nevndin tekur undir við HaVN 19-01-2022.

Klaksvíkar Býráð 27. januar 2022:
Tilmælið frá FíN 27-01-2022 einmælt samtykt.

11/22
21/01884-6 Umsókn um rakstrarstuðul fyri ár 2022, Gloria - *flyting millum kontur, seinna viðgerð*

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.
1 Fíggjarnevndin	20.12.2021	154/21
2 Klaksvíkar Býráð	21.12.2021	195/21
3 Klaksvíkar Býráð	27.01.2022	11/22

Frágreiðing um málið:
Málið varð fyrru ferð viðgjørt av býráðnum 21. des. 2021.

Fíggjarnevndin 20. desember 2021:
Nevndin tekur undir við tilmælinum, dagf. 15-12-2021.

Klaksvíkar Býráð 21. desember 2021:
Tilmælið frá FíN 20. des. 2021 einmælt samtykt.

Klaksvíkar Býráð 27. januar 2022:
Tilmælið frá BýR 21-12-2021 einmælt samtykt við seinnu viðgerð.

12/22
21/01954-2 Leikvøllurin á Másheyggi - *flyting millum kontur, seinna viðgerð*

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.
1 Mentanarnevndin	07.12.2021	80/21
2 Fíggjarnevndin	14.12.2021	149/21
3 Klaksvíkar Býráð	21.12.2021	201/21
4 Klaksvíkar Býráð	27.01.2022	12/22

Frágreiðing um málið:
Málið varð fyrru ferð viðgjørt av býráðnum 21. des. 2021.

Mentanarnevndin 7. desember 2021:
Nevndin tekur undir við tilmælinum dagf. 25-11-2021.

Fíggjarnevndin 14. desember 2021:
Nevndin tekur undir við MeN 07-12-2021.

Klaksvíkar Býráð 21. desember 2021:
Tilmælið frá FíN 14. des. 2021 einmælt samtykt.

Klaksvíkar Býráð 27. januar 2022:
Tilmælið frá BýR 21-12-2021 einmælt samtykt við seinnu viðgerð.

13/22
21/02045-1 Ung í Arbeiði / Trivnaðardeildin - *flyting millum kontur, seinna viðgerð*

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.
1 Trivnaðarnevndin Børn og Ung	07.12.2021	63/21
2 Fíggjarnevndin	14.12.2021	150/21
3 Klaksvíkar Býráð	21.12.2021	196/21
4 Klaksvíkar Býráð	27.01.2022	13/22

Frágreiðing um málið:
Málið varð fyrru ferð viðgjørt av býráðnum 21. des. 2021.

Trivnaðarnevndin Børn og Ung 7. desember 2021:
Nevndin tekur undir við tilmælinum, dagfest 29-11-2021.

Fíggjarnevndin 14. desember 2021:
Nevndin tekur undir við B&U 07-12-2021, og at hildið verður fram við leistinum, Ung í Arbeiði er bygt á seinnu árini.

Klaksvíkar Býráð 21. desember 2021:
Tilmælið frá FíN 20. des. 2021 einmælt samtykt.

Klaksvíkar Býráð 27. januar 2022:
Tilmælið frá BýR 21. des. 2021 einmælt samtykt við seinnu viðgerð.

Postboks 2 . FO-710 Klaksvík . Faroe Islands . Tlf. 410000 . Fax. 410001

Fundurin lokin kl. 18:20

_____
Karl Johansen

_____
Atli S. Justinussen

_____
Beinta Klakstein

_____
Gunvá við Keldu

_____
Símun á Høvdanum

_____
Jóhanna Christiansen

_____
Eyðstein Ó. Poulsen

_____
Annika S. Biskopstø

_____
Óli M. Lassen

_____
Signhild V. Johannesen

_____
Tummas J. Lervig